## Miðnámsskúlanum í Suðuroy

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá **1. august 2008** nøkur størv sum adjunktur/lektari ella tímalærari leys at søkja.

**Eitt starv í evnafrøði.**

Eitt starv í samfelagsfrøði saman við øðrum studentaskúlalærugreinum, herundir teldu-vegleiðari.
Tímar, uml. 4, í hesum lærugreinum: enskt, latín, heimsspeki, alis/evnafrøði, lívfrøði, geografi, tónleikur, støddfrøði, alisfrøði og sálarfrøði.

Umsøkjarar, ið ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, og sum verða settir, skulu í august mánaði taka námsfrøðiligt innleiðsluskeið, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

Skúlin fer í tilmæli sínum um setan í fast starv at leggja dent á, at umsøkjararnir hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viður-skifti, og um teir ikki hava tað, at teir eru sinnaðir at ogna sær innlit og vitan um hetta. Umsøkjarar, ið ikki hava kunnleika til føroysk mál og føroysk viðurskifti, kunnu søkja um setan sambært treytunum í 2-ára sáttmála. Hetta merkir, at umsøkjari verður settur í eitt 2 ára tíðaravmarkað starv, og at skúlin rindar flyti- og ferðaútreiðslur aftur og fram millum verandi bústað og Miðnámsskúlan í Suðuroy. Upphæddin til flyti- og ferðaútreiðslur er í mesta lagi 30.000 kr., og er hon skattskyldig. Um viðkomandi seinni ynskir at søkja fast starv við Miðnámsskúlan, verður søkt á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar.

Miðnámsskúlin flytir í nýggj hølir til jóla. Roknað verður við, at lærararnir hjálpa til við innrættingini av hølunum.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um endamál skúlans við at venda sær til leiðslu skúlans ella við at vitja heimasíðu skúlans: www.midnam.fo

Starvssetanin verður sambært sáttmála millum Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF) og Fíggjarmálastýrið. YF-umsóknarbløð fáast frá Yrkisfelagnum ella frá skúlanum (tlf. 373622, faks 374026, e-mail ole@midnam.fo)

Umsóknin skal sendast til Miðnámsskúlan í Suðuroy, att. Ole Laursen, deildarleiðari, 900 Vágur, í seinasta lagi **16. mei 2008.**

mbf
Meginfelag teirra Breklaðu í Føroyum

## MBF Aðalfundurin 2008

Sum fyrr fráboðað verður aðalfundurin hjá MBF

**Mikudagin 7. mai kl. 19.00 í MBF húsinum**

Aðalfundarskráin verður smb. lógum felagsins

Aftaná aðalfundin heldur Kathrina L. Joensen, cand. pæd. psyk. og sjúkrarøktarfrøðingur fyrilestur um

***»At koma fyri seg aftaná broytt lívskor«.***

**Møtið fjølment.**

**STARVSNEVNDIN**

## Fobiskeið

**Hevur tú onkra fobi – er sera bangin fyri onkrum ávísum – kann tú fáa góða viðgerð og samstundis læra teg at viðgera teg sjálva/sjálvan.**

**Skeiðið verður tann 16. og 17. mai kl. 10-16.**

**Tilmelding á tlf. 21 82 86**

SÁLARFRØÐIDEPILIN
V/JEGVAN BÆK
AUT. SÁLARFRØÐINGUR
TINGHÚSVEGUR 18
TÓRSHAVN





## Sethús til sølu

Talan er um sethúsaognina matr. nr 482, Klaksvík, ið liggur Kirkjubrekka 2, 700 Klaksvík. Sethúsini eru umleið 150 $m^2$ og nýliga renoveraði. Íbúð er í kjallarahæddini.

Sethúsini liggja í miðbýnum í Klaksvík, men samstundis er frítt út til fríøkið við Vágstún.

Áhugaði eru vælkomin at seta seg í samband við skrivstovuna fyri at síggja sethúsini.

HANSEN & THOMASSEN
ADVOKATFIRMA

Bryggjubakki 22
Postsmoga 106
110 Tórshavn
tel: (+) 298 359595
fax: (+) 298 359596
T-postur: advokat@advokat.fo

## Bátastevnan á Toftum

Framsýning av bátum og húsvognum





**www.stubbin.fo**
**stubbin@stubbin.fo**
**Tlf 471 800**

## HALT FERIU Í SKARRILD

15 min. frá Herning, Danmark



Húsið stendur í lítlu hugnaligu landsbygdini Skarrild, ið er 20 km í ein útsynningvestan úr Herning.

Vitja heimasíðuna, har fær tú meira at vita: www.hammershus.fo

(+45) 236.781.66 ella (+45) 236.781.65
www.hammershus.fo - torfinnur@email.fo

**Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður**




**Vit hava drúgvar royndir – spyr okkum um tilboð.**
**Tlf. 319992 / 219991 · t-postur: tmv@post.olivant.fo**

Sp/f. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74